# Lívsformar

Í Føroyum hava vit ókeypis læknahjálp og skúlagongd, og vit fáa fíggjarliga hjálp, um vit einki arbeiði hava. Sammett við onnur menniskju í øðrum heimspørtum, so hava vit sera góð lívskor. Tó eru lívskorini hjá føroyingum ógvuliga ymisk. Summi arbeiða nógv, og onnur arbeiða minni ella als ikki. Summi eiga nógvar pengar, onnur eiga ikki so nógvar pengar.

Í hesi undirvísingargongdini skulu vit hyggja at føroyingum ígjøgnum sosiologiskar brillur. Vit fara at viðgera lívsformar.



## Tosið saman um hesar spurningar

1. Hvat gera foreldrini? Hvussu nógv arbeiða tey? Hvønn týdning hevur arbeiðið fyri tey?
2. Nær eru vit rík ella fátæk?
3. Hvat er eitt eydnuríkt lív?
4. Hvat halda tit hevur týdning fyri, hvussu vit hvør í sær velja at liva okkara lív?

## Vit arbeiða við lívskorum og lívgóðsku



Summi velja at arbeiða niðursetta tíð ella als ikki, soleiðis at tey brúka tíðina til annað enn arbeiði. Tað merkir eisini, at tey hava kanska ikki so nógvar pengar at brúka.

Onnur arbeiða nógv og tjena nógvar pengar. Tað kann eisini vera, at onkur noyðast at arbeiða meiri enn vanligt fyri at klára at forsyrgja eini familju.

Føroyingar liva sítt lív á ymiskan hátt, og arbeiðið hevur týdning í tí sambandinum. Vit koyra ofta fólk í ymiskar bólkar. Sagt verður, at vit hava ymiskar lívsformar.
Foreldur tykkara hava eisini ymiskar lívsformar og tað fara tit eisini at hava. Grundgevingarnar eru nógvar, hví vit velja, sum vit gera, men avgerandi er eisini, hvussu vit uppfata lívsgóðsku, og hvat vit halda vera eitt gott lív.



*Tað, ið foreldrini gera, hevur stóra ávirkan á, hvussu tey liva lívið. Hvussu fert tú at bera teg at í samband við arbeiðslívið?*

Summi fara til arbeiðis fyri at vinna pening, so tey kunnu gjalda rokningar og gera annars tað, tey fegin vilja sleppa at gera í frítíðini. Onnur síggja arbeiðið sum mál í sær sjálvum og raðfesta tískil arbeiðið sera høgt. Hesar báðar tilgongdirnar til arbeiðslívið nevna vit lívsformar.
Tit fara at gera eina lítla kanning. Tit skulu tosa við annað av foreldrunum og finna útav, hvønn lívsform tey hava.

## Førleikamál

- At greiða frá, hvat eyðkennir teir tríggjar lívhættirnar: løntakarin, tann sjálvstøðuga og tann karrierubundna.
- At gera spurningar til eina samrøðu.
- At samanlíkna úrslit frá eini kanning og vísa kanningina í eini talvu.

## Lívshættir

Summi fólk arbeiða allatíðina og hava ongantíð frí. Onnur eru til arbeiðis og hava frí, tá ið tey ikki eru til arbeiðis. Orsøkin til hetta er, at okkara arbeiðsmynstur eru ymisk. Eitt, sum er serligt fyri Føroyar, er at í Føroyum eru nógvir sjómenn og hetta ávirkar lívið hjá teimum, ið eru heima.



Hvønn morgun fara fleiri túsund føroyingar til arbeiðis. Arbeiðslívið hevur stóran ávirkan á, hvussu gerandisdagurin gongur hjá hvørjum einstøkum. Heldur ikki sær gerandisdagurin eins út hjá øllum. Tey allarflestu fara til arbeiðis um morgunin, summi fara til arbeiðis um kvøldið, og uppaftur onnur arbeiða um náttina. Nøkur fara við flogfari á onkran fund og onnur hava sítt yrki umborð á fiskiskipi ella handilsskipi.
Hetta kalla vit ymiskar lívsformar.

## Uppgáva

Áðrenn tú lesur meir um lívsformar, mást tú kenna týdning av orðunum, ið koma fyri.
Set setningarnar saman, soleiðis at týdningurin er tann rætti.

Ymiskir hættir at liva

Tá ið man eigur sítt egna virki...

Tá ið man arbeiðir hjá einum arbeiðsgevara…

Tá ið arbeiðið hevur hægstu raðfesting, og alt annað kemur í aðru røð…

Tá ið man hevur serligar førleikar og nógvar royndir at loysa eina heilt ávísa uppgávu…

Er man karrierubundin.

Er man løntakari.

Er man sjálvstøðugur vinnurekandi

Er man kvalifiseraður ella egnaður.

Eru ymiskir lívformar

## Lívsformar

Vit býta lívsformar í tríggjar bólkar:

- Tann sjálvstøðugi lívsformurin
- Lønararbeiðaralívsformurin
- karrierubundni lívsformurin

## Tann sjálvstøðugi

Eitt, ið eyðkennir sjálvstøðuga lívsformin, er, at klokkan setur ikki markið, nær tú møtir til arbeiðis, ella nær tú hevur frí. Arbeiði og frítíð smelta saman. Tað er arbeiðið, ið skal gerast, ið ger av, nær og hvar og hvat, tú gert.
Vit kunnu taka eitt dømi. Timburmaðurin, ið arbeiðir hjá sær sjálvum, hevur ongan arbeiðsgevara, ið ansar eftir, at hann møtir hvønn morgun kl. 8.00. Tá ið timburmaðurin er liðugur at gera tað, hann skal gera, so brúkar hann kvøldini at skriva rokningar, skriva tilfarslista og at leggja til rættis dagin eftir. Tað er eingin greiður skilnaður millum arbeiði og frítíð. Man tosar í staðin fyri um eitt dagsverk, sum merkir tað arbeiðið, ið verður gjørt í ein dag. Familjan hjálpir, tá ið á stendur. Dømi um sjálvstøðuga lívsháttin er m.a. sjálvstøðugi handverkarin, bóndin og tey, ið eiga eina lítla fyritøku av onkrum slag.



*Bóndin, sum hevur sítt egna landbrúk, er eitt gott dømi um sjálvstøðuga lívsháttin*

## Lønararbeiðarin

Hjá lønararbeiðaranum er greitt mark millum arbeiði og frítíð. Lønararbeiðarin er til arbeiðis fastar tíðir hvønn dag. Tá ið hann er liðugur at arbeiða, hevur hann frí. Lønararbeiðarin arbeiðir fyri at tjena pengar. Pengarnar brúkar hann at gjalda rokningar og annars tað, ið hann hevur hug til at gera, tá ið hann hevur frí. Lønararbeiðarin arbeiðir, tá ið hann er til arbeiðis, og hevur frí, tá ið hann er heima við hús. Dømi um lønararbeiðaralívsformin er t.d. hann ella hon, ið arbeiðir hjá einum handverkara ella arbeiðir í einum handli.




*At arbeiða í einum handli, er typiska lønararbeiði. Tú arbeiðir ávíst tímatal, og tú hevur frí, tá ið tú ikki ert til arbeiðis.*

## Tann karrierubundni

Fyri karrierubundna lívsformin hevur arbeiðið hægstu raðfesting. Arbeiðið er sjálvt lívið ella í øllum førum ein stórur partur av lívinum. Fríløturnar verða brúktar til at hvíla seg, so arbeiðast kann meiri. Tann karrierubundni hugsar um arbeiðið allatíðina, eisini tá ið hann slær grasvøllin ella ger døgurða. Hjá tí karrierubundna er einki greitt mark millum arbeiði og frítíð. Onkuntíð verður arbeiðið eisini tikið heim við um kvøldið. Fyri henda er arbeiðið ein háttur at mennast persónliga, har tað einki bilar, um arbeiðsuppgávurnar gerast fleiri og meiri avbjóðandi. Samtíðis, sum arbeiðið fyllir nógv, so roynir tann karrierubundni allatíðina at útbúgva seg og soleiðis betra um sínar førleikar. Betri størv og lønarhækkan er motivatiónin hjá tí karrierubundna.



## Uppgáva: Yvirlit

Meðan tú lesur, skalt tú hava yvirlit.
Flyt útsagnirnar niðanfyri inn í kassarnar:

Tann sjálvstøðugi

Lønararbeiðarin

Tann karrierubundni

1. Fastar arbeiðstíðir.
2. Avbjóðandi arbeiðsuppgávur og strembanin eftir persónligari menning ger av, hvussu nógv tú arbeiðir.
3. Tú arbeiðir, tá ið arbeiði er at gera



## Fyrireika samrøðu við foreldrini

1. Finnið saman tvey og tvey og lesið tekstin, Lívsformar.
2. Gerið ein lista við eyðkennum fyri hvønn einstakan lívshátt
3. Gerið fimm spurningar út frá listanum. Spurningarnir skulu snúgva seg um arbeiði.
4. Tá ið øll eru liðug, verða allir spurningarnir viðgjørdir, og 10 teir bestu verða valdir. Hesir spurningarnir verða grundarlagið undir samrøðu, ið tit fara at hava við eitt av foreldrunum. Svarini skulu vera anonym, t.v.s. nøvini á foreldrunum skulu ikki skrivast niður.
5. Tosið við foreldrini. Tit kunnu skriva svarini ella brúka upptakara.
6. Tit gera niðurstøðu um lívsformin hjá øðrum foreldrunum.

## Yvirlit

1. Hyggið at endaligu úrslitunum og fáið yvirlit yvir, hvørjir lívsformar eru umboðaðir.
2. Gerið eitt sirkuldiagramm yvir lívsformarnar
   - hvussu nógv eru sjálvstøðug?
   - hvussu nógv eru lønararbeiðarar?
   - hvussu nógv eru karrierubundin?

## Hugsið tykkum

Nú skulu tit øll ímynda tykkum eitt lívsyrki, sum tit kundu hugsað tykkum at havt.
Teljið upp, hvussu nógv tykkara hugsa um at gerast sjálvstøðug, lønararbeiðarar og karrierubundin.
Gerið eitt sirkuldiagramm og samanberið við diagrammið yvir foreldrini. Líkjast tey?